

www.oljan.fo

**Jan Müller** 09 - 02 - 2012

# Kostar 420 mia. at rudda Norðsjógvin

Tað verður stórarbeiði og harafturat sera kostnaðarmikið at rudda upp í Norðsjónum, tá oljuævintýrið einaferð fer at halla. Tvey ráðgevarafeløg, sum hava hugt at spurninginum, siga, at prísurin verður í minsta lagi 420 milliardir krónur. Tey næstu 30 árini skulu meiri enn 470 boripallar beinast burtur, og ráðgevarafeløgini Douglas-Westwood og Deloitte siga, at tað fer at kosta knappliga eina milliard krónur at toga ein pall til lands, lata brunnin aftur og at høggja pallin upp. Niðurstøðan hjá teimum er tí, at tað fer at kosta olju- og gassfeløgunum minst 420 milliardir krónur at rudda upp eftir sær í Norðsjónum. Roknað verður við, at ruddingin fer at byrja av álvara í árunum millum 2016 og 2031, og at um somu tíð verða stórar vindorkuútbyggingar í Norðsjónum. Tað fer at elva til eina sera harða kapping um skip, sum hava stóra lyftiorku, tí tað verður stórur tørvur á slíkum skipum bæði til vindorkuútbyggingarnar og ruddingina hjá oljuvinnuni, siga tey bæði ráðgevarafeløgini. Eftir teirra tykki verður neyðugt at byggja fleiri egnað skip, samstundis sum umstøðurnar uppi á landi verða gjørdar klárar. Tey bæði ráðgevarafeløgini ávara ímóti at bíða við at rudda olju- og gassleiðirnar, tí tað fer bara at gera arbeiðið uppaftur dýrari. Einstakir býir, eitt nú Esbjerg, eru langt síðani farnir undir at fyrireika seg til ta stóru ruddingina í Norðsjónum, og Douglas-Westwood og Deloitte siga, at tað liggja stórir inntøkumøguleikar í ruddingini og upphøggingini.